# Stjóraskifti í Føroya Kolvetni

**Fyrrverandi nevndarformaðurin, Graham Stewart, tekur nú við sum stjóri í Føroya Kolvetni.**

OLJUVINNA
*Heri á Rógvi*

Broytingar eru gjørdar í fyrisitingini og eigaraskaranum av føroyska oljufelagnum, Føroya Kolvetni.

Bretaska oljufelagið Dana Petroleum plc hevur nýtt sín møguleika (option) at keypa ein størri part av partabrøvunum í felagnum. Dana Petroleum hevði forkeypsrættin til tjúgu prosent, men upplýst verður ikki, hvussu stóran part Dana eigur av Føroya Kolvetni sum er.

Tað er Dana, ið kunnger tíðindini á heimasíðuni hjá fyritøkuni.

Nevndarformaðurin í Dana sigur á somu heimasíðu, at teir gleða seg at fara ígongd við royndarboringar, og teir síggja nógvar møguleikar í leitiøkinum, teir hava saman við Agip.

Tað hevur tó ikki eydnast at fáa fleiri viðmerkingar frá Dana.

Fyrrverandi nevndarformaðurin, Graham Stewart, verður nú stjóri í Føroya Kolvetni. Graham Stewart hevur eisini havt tilknýti til Dana, men hann verður nú stjóri í Føroya Kolvetni.

Tað hevur ikki verið møguligt at fingið at vita, hvør framtíðin hjá Nils Sørensen, forstjóra, verður í Føroya Kolvetni. Víst verður til eitt tíðindaskriv, ið verður sent út í komandi viku.



*Nils Sørensen er ikki longur ovasti fyri Føroya Kolvetni. Graham Stewart verður nýggi forstjóri.*

# Skrásett parlag í tingi í februar

**Høgni Hoydal sigur seg rokna við, at upprit til aðalorðaskifti um persóns-, familju-, og arvarætt verður borið niðan í tingið í februar**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

Nógv umrødda málið um yvirtøku av persóns-, familju, og arvarætti skapti í sínari tíð nógv rok, tá málið kom fram í sínari tíð.

Tað er serliga málið viðvíkjandi Skrásettum parlagi, ið fekk menn at hótta við einum og øðrum.

Støðan hjá Høgna Hoydal hevur allatíðina verið, at málið um yvirtøkuna skal niðan í tingið. Fyrst av øllum til eitt aðalorðaskifti.

– Vit eru í holt við at at yvirtaka persóns-, familju- og arvarætt. Hetta er eitt stig á leiðini at gerast til eitt sjálvstýrandi land, har vit taka ræði á øllum okkara viðurskiftum. Vit kunnu ikki bara longur útflyta okkara trupulleikar til Danmarkar. Vit verða noydd at taka spurningar upp í Føroyum, sum eru viðkvæmir. Málið snýr seg um eitt av grundprinsippunum í okkara lóggávu, segði Høgni Hoydal í oktober.

Landsstýrismaðurin í lógarmálum upplýsir, at málið er komið so langt ávegis, at tað liggur á borðinum hjá honum, og hann skal gera eina innleiðing og gera málið klárt at bera niðan í tingið.

Tingið fer so at viðgera málið sum eitt aðalorðaskifti, har ymsu sjónarmiðini sleppa til orðanna, men eingin atkvøðugreiðsla verður hildin.

– Eg vóni bert, at tingmenn ikki bert leggi seg í grøvirnar, men geva málinum eina góða sakliga viðger, sigur Høgni Hoydal.

Málið um skrásett parlag hevur eisini verið frammi sum ein hóttan fyri samgonguna, men Høgni Hoydal ætlar at steðga við at leggja málið fyri tingið, hóast fleiri samgongutingmenn hava sagt, at teir vilja ikki vera partur av einari samgongu, ið leggur sovorðið mál fram. Tó siga teir seg ganga við til eitt aðalorðaskifti.

Í oktober segði Høgni Hoydal soleiðis um samgongustøðuna:

– Eg risikeri ikki nakra samgongu. Eg havi sagt, at mín ábyrgd sum landsstýrismaður í lógarmálum er at leggja lógaruppskot fyri tingið, sum eg haldi vera neyðug fyri at skapa eitt føroyskt rættarsamfelag. Har er persóns-, familju- og arvarættur serstakliga týdningarmikil. Vit eiga at kunna taka eina viðgerð av hesum. Hetta er lógarmál og ikki nakað familjumál, sigur Høgni Hoydal.

# Føroya Bjór vil bryggja sterkari

**Størsta bryggjaríið í landinum hevur sent umsókn til Vinnumálaráðið um at bryggja sterkari øl til útfluttning**

RÙSDREKKA
*Heri á Rógvi*

Føroya Bjór hevur fyri triðju ferð sent umsókn til Vinnumálaráðið um at fáa loyvi til at bryggja við alkoholinnihaldið áljóðandi meira enn 5,8%.

Hetta upplýsir Einar Waag, stjóri fyri Føroya Bjór.

– Vit hava roynt tvær ferðir áður at søkja um loyvið - hjá fleiri ymsum landsstýrismonnum, men higartil hava vit bara fingið noktandi svar, sigur Einar Waag.

Fyrst varð søkt hjá Ivan Johannesen, síðani hjá Finnbogi Arge og nú til Bjarna Djurholm.

Hendan triðja umsóknin hevur kortini ikki fingið nakað afturljóð frá Vinnumálaráðnum.

Ætlanin er at sterka øli nýtast til útfluttning. Eitt nú roknar Einar Waag við, at selt kundi verið til útlendsku skipini.

– Vit hava ongar ætlanir ella vónir um at bryggja sterkari øl til føroyska marknaðin, staðfestir Einar Waag.

Tað krevur eitt sindur av produktútvikling at fara undir bryggjan av sterkara slagnum, men talan er ikki um tær heilt stóra broytingar.




*Føroya Bjór vil sleppa at gera tað eitt sindur sterkari.*





*Børn tendra livandi ljós framman fyri ST-skrivstovuni í Bagdad. Tey kenna avleiðingina av einum álopi. Tað vita føroyingar eisini, men okkara uttanveltaða støða ger, at vit onga støðu hava til ætlaða álopið hjá USA á Irak*

*Mynd: Suhib0 Salem (Reuter)*

# Krígshóttan viðkemur ikki føroyingum

**Vit skulu onga almenna meining hava um eitt møguligt álop á Irak, sigur Anfinn Kallsberg løgmaður, sum fær stuðul frá løgtinginum. Hann viðgongur, at løgtingsins hernaðarsamtykt er eitt politiskt skálkaskjól, og tí noyðast føroyingar at taka virknan lut í altjóða verjupolitikki. NATO er svarið**

KRÍGSHÓTTAN
*Ingi Rasmussen*

– Sjálvandi havi eg ein støðu sjálvur, men sum Føroya løgmaður havi eg onki við hatta málið at gera, sigur Anfinn Kallsberg løgmaður.

Heimurin stendur á gáttini til eitt kríggj, ið kann breiða seg. 100.000 hermenn standa á markinum til Irak, og USA streingir á at fáa vesturheimin at styðja eitt álop á einaræðisstýrið hjá Saddam Hussain. Fleiri lond í Sameindu tjóðum muta ímóti, teirra millum Týskland og Frakland, og stórar mótmælisgongur taka til orðanna ímóti krígnum.

Eitt kríggj elvir til ófatiligar líðingar fyri fólkið í Irak, og vit sleppa illa undan at taka støðu til, um tað er ein neyðugur prísur at gjalda fyri eitt demokrati, sum USA vil seta í verk.

Í Føroyum er kvirt. Almennu Føroyar taka ikki støðu, hóast vit óbeinleiðis eru partur av vesturlendsku samgonguni, og NATO leingi hevur havt sín fót á føroyskari jørð.

## Eitt skálkaskjól

Føroya løgting hevur samtykt, at Føroyar skulu halda seg uttan fyri allar ósemjur millum lond, og tí fær løgmaður ikki givið sína støðu til kennar, sigur hann.

– Eg kann ikki sum Føroya løgmaður, ið er innsettur av Føroya løgtingi, ganga ímóti samtyktum hjá løgtinginum, og tí kann eg hvørki geva mín stuðul ella tala at, sigur Anfinn Kallsberg.

Tað ljóðar sum eitt skálkaskjól, viðgongur løgmaður, tí tað ber ikki til at vera uttanveltaður, tá grundleggjandi virði standa upp á spæl og eitt fólk stendur fyri ófatiligum líðingum í einum kríggi.

– Kanska er tað at rópa seg uttanveltað ein lættur máti hjá føroyingum at sleppa undan at taka eina støðu. Tað er ein holdningur, sum ikki heldur í longdini, tí vit sleppa helst ikki undan at vera drigin uppí onkursvegna. Vit noyðast at fara aktivt inn í slík mál, og tað krevur, at allir flokkar viðgera hernaðarmálið av nýggjum, og at løgtingið samtykkir ein nýggjan leist at arbeiða út frá. Men Føroya løgmaður kann ikki av sínum eintingum fara út í eitt slíkt kjak um uttanríkispolitisk mál, fyrr enn vit hava ein politikk á økinum, sigur Anfinn Kallsberg.

## Ongan lúður

Nøkunlunda somu støðu sum løgmaður hevur Hergeir Nielsen, formaður í Uttanlandsnevndini hjá løgtinginum.

– Almennu Føroyar hava ongi rættindi í uttanríkispolitikki og hava tískil ongan lúður at blása í. Sitandi samgonga hevur sett sær fyri at reka vanligan uttanríkispolitikk, men enn hava vit onga heimild at gera vart við okkum í uttanríkispolitikki, segði Hergeir Nielsen í sendingini Fokus hjá Sjónvarpi Føroya týsdagin.

Á løgtingi vísir tað seg, at okkara fólkavaldu tingmenn ikki tosa um krígshóttanina, og hóast teir hava møguleika at seta fyrispurningar og reisa kjak, verður málið ikki tikið upp á tungu eins og í øllum okkara grannalondum. Hergeir Nielsen heldur tað vera av tí einføldu orsøk, at føroyingar ikki umsita hetta økið.

## Upp í NATO

Løgmaður hevur altso sett sær fyri at broyta hernaðarsamtyktina á Føroya løgtingi. Í fyrstu atløgu hevur samgongan samtykt, at Føroyar skulu hava innlit, ábyrgd og avgerðarrætt í øll hernaðarpolitisk viðurskifti. Næsta stigið verður at knýta Føroyar beinleiðis upp í eitt samstarv, sum byggir á vesturlendskan verjupolitikk.

– Vit hava avgjørt, at vit á ongan hátt skulu vera ein bági fyri okkara grannar, og allir okkara nærmastu grannar eru jú partar av einum verjusamtaki. Tað er heilt greitt, at vit eisini frá føroyskari síðu kenna okkum sum part av vesturheiminum og hava NATO á okkara jørð, og tí er ikki so langt til eitt samstarv, sigur Anfinn Kallsberg.

Í løtuni er ósemja í NATO, um kríggj er ein neyðugur prísur at fáa bilbugt við Saddam Hussain. Men løgmaður vil ikki siga, hvønn hann styðjar, fyrr enn Føroyar eru vorðnar ein virkin partur av altjóða samfelagnum. Helst NATO.

# Faðir vár verður óbroytt

**Ongin ætlan er at broyta Faðir vár, sigur Hans Jacob Joensen bispur, sum harmast, um tað er fatanin millum fólk**

BÍBLIUTÝÐING
*Ingi Rasmussen*

Bispur arbeiðir saman við øðrum við at gera eina nýggja føroyska bíbliutýðing, sum er meira tíðarhóskandi málsliga.

Í hesum sambandi hava nógv kanska fingið ta fatan, at Faðir vár skal broytast. Tað hevur ljóðað, at orðingin »fyrigev okkum syndir okkara« skuldi broytast til »fyrigev okkum skuldir okkara«.

Hetta hevur fingið nógv at hvøkka við, tí Faðir vár er so týðandi partur í barnatrúnni.

Hans Jacob Joensen bispur harmast um, at fólk hava fingið ta fatan, at Faðir vár skal broytast, og hann vísir tí staðiliga aftur.

– Eg eri eitt sindur keddur, um fólk halda, at Faðir vár verður øðrvísi í okkara nýggju týðing av bíbliuni, tí Faðir vár á føroyskum verður als ikki broytt, sigur Hans Jacob Joensen.

Talan má vera um eina misskiljing, heldur bipsur, tí fleiri útgávur eru av Faðir vár, og tað hevur hann greitt tíðindafólkum frá. Í Føroyum er Faðir vár ein blandingsformur av útgávuni hjá Matteusi og partvíst hjá Lukasi evangelisti.

– Um tú samanber við tað danska Fader vor, so verður sagt »forlad os vores skyld således som vi forlader vores skyldnere«; tað er úr Matteus, og soleiðis er vist yvirhøvur. Men á føroyskum eitur tað »fyrigev okkum syndir okkara«, og tað er tikið úr Lukasar evangelium.

Standardformurin av Faðir vár á føroyskum, sum fólk hava fingið við móðurmjólkini, verður sostatt púra óbroyttur.

– Tað býr djúpt í okkum, og eg haldi eisini, at tað situr betri á føroyskum, staðfestir Hans Jacob Joensen.